# Fangar tú ljóðið

**Tað var einki minni enn ein fangandi konsert í Klæmintsgjógv, sum Rasmus Lyberth, Kristian Blak og Heðin Ziska Davidsen framførdu úr einum gummibáti í sambandi við útgávuna av fløguni »Piniartut«, sum umsett til føroyskt merkir fangararnir**



*Eg fekk ikki afturhald, men mátti bara halda fram at syngja. Tónarnir komu mestsum av sær sjálvum, segði Rasmus Lyberth eftir konsertina í Klæmintsgjógv*





FLØGUÚTGÁVA

*Rúnar Reistrup*

Tað var ein glaður og ikki sørt errin Stefan Simonsen, leiðari á Nordens Institut í Grønlandi, ið hósdagin bjóðaði fjølmiðlum og øðrum umborð á Norðlýsið. Her skuldi hann løtu seinni, saman við tveimum av kempunum í vesturnorðurlendskum fólkatónleikahøpi, Rasmus Lyberth og Kristian Blak, leggja fram nýggju fløguna »Piniartut«, sum Nordens Institut í Grønlandi gevur út.

Fløgan er ætlað sum tað grønlendska íkastið til eina vestnorðurlendska fangara- og veiðimannamentanar framsýning, sum norðurlandahúsini í Føroyum, Íslandi og Grønlandi og onnur í løtuni arbeiða við at fyrireika. Ætlanin er, at framsýningin skal ferðast millum tey trý vesturnorðurlendsku londini, og síðan fara víðari út í heim.

## Fiskiveiða

Leiðarin á Nordens Institut í Grønlandi, Stefan Simonsen, ið fleiri munnu kenna sum tónleikaralærara í Vágunum, har hann búi eitt skifti, er finni, og tað setir sín týðuliga dám á fløguna. Hon er nevniliga tikin upp í Finnlandi og á henni eru fleiri finnskir sangir. Eins og hinir sangirnir á fløguni, ið allir eru á grønlendskum, snúgva teir seg um veiðimentan, fyri tað nógva innan fiskiveiði.

Rasmus Lyberth, sum var í Føroyum í sambandi við Listastevnuna, segði seg vera sera væl nøgdan við fløguna.

- Tað er øgiliga spennandi tá tónleikarar úr einum landi arbeiða við løgum úr einum øðrum landi. Eg haldi at tann tulkanin, sum kemur burturúr, er sera gevandi, segði Lyberth, meðan hann bíðaði eftir at verða sigldur inn í Klæmintsjógv.

## Konserthelli

Tá Norðlýsið eftir stuttari tíð hevði flutt seg úr Havn vestur um Hestoynna, rópti skiparin, Birgir Enni, á fólk um at fara í bjargingarvestarnar. Nú skuldu tey á konsert.

Við ikki sørt av dirvi lupu fólk úr øllum aldursbólkum og vektklassum í teir báðar gummibátarnar, ið síðan sigldu konsertáhoyrararnar inn í tað stórsligna hellið, ið nevnt verður Klæmintsgjógv. Her hevur Kristian Blak við øðrum spælt fleiri fløgur inn. Tann seinasta, ið kallast »Anybody Home?« varð givin út í farnu viku. Her spælir saxofonisturin John Tchicai nýkomponerað løg hjá millum øðrum Sunnleifi Ramussen og Kristiani Blak.

Hósdagin var konserthellið reserverað til Rasmus Lyberth, Kristian Blak og Heðin Ziska Davidsen, sum frá einum av gummibátunum spældu og sungu løg av fangara-fløguni umframt nøkur løg, sum Kristian Blak hevur smíðað við helliframførslu fyri eygað.

## Undir Hestbjørgini

Eftir at tann, eftir umstøðunum, langa konsertin var av, og teir báðir gummibátaskipararnir høvdu fingið gongd á motorarnar aftur, avgjørdi Birgir Enni at fara ein túr undir og ímillum Hestbjørgini í gummibátinum við tónleikarunum og innbodnu gestunum.

Tíman frammanundan vórðu eyguni blendað inni í hellinum og sóu einki. Nú slapp hesin sansur til sín rætt aftur, meðan áhoyrarar og tónleikarar málleysir vórðu tiknir ígjøgnum smalar rivur og inn í myrkar holur, meðan tey aktaðu ráðini frá Birgir Enni.

- Haldið høvd og armar innanborða, um tit ætla at varðveita tey, vóru boðini frá manninum ið stýrdi motorinum.

Komin trygt og væl umborð aftur á Norðlýsið var grønlendski sangarin í góðum lag.

- Hatta var fantastiskt. Eg fekk ikki afturhald, men mátti bara halda fram at syngja. Tónarnir komu mestsum av sær sjálvum, segði Rasmus Lyberth, sum seinni um kvøldið hevði eina aðra konsert í landfasta Norðurlandahúsinum

## Leypa yvir Danmark

At tað júst er føroyska forlagið Tutl, sum gevur eina fløgu hjá grønlendska norðurlandastovninum út kann kanska tykjast eitt sindur løgið. Men sambært leiðaranum á Nordens Institut í Grønlandi, so hevur Tutl, við Kristiani Blak á odda, eitt so stórt heimsumfatandi kontaktnet og væl roynt produktiónsapparat at tað er best egnaða forlagið í vesturnorðurlondum til eina útgávu sum »Piniartut«.

Og nú norðurlandastovnurin hevur givið fløgu út í samstarvi við kreftir úr Føroyum og Finnlandi, fegnast Stefan Simonsen um, at tað hevur eydnast at fremja eina verkætlan heilt uttan stuðul úr Danmark.

- Tað er ikki tí at nakað ilt er í at fáa stuðul frá donskum mentunarstovnum og grunnum, men í Grønlandi verður so at siga einki gjørt uttan danska hjálp. Tí haldi eg at tað er umráðandi at man roynir at fremja verkætlanir, har vit so at siga leypa Danmark yvir. Bara fyri at ikki alt grønlendskt skal hava ein feril av donskum uppi í sær, sigur Stefan Simonsen.

Grønlendska konsertin í hellinum í Hestoynni og búrfiskasuppan umborð á Norðlýsinum í førosyka mjørkanum aftaná var so vesturnorðurlendsk sum slíkt kann gerast.



Gjestal Vestlandsgarn-Superwash Sport

# Damu- og harratroyggja

## Uppskriftin hesa vikuna



| Størrelser: | | liten | middels | stor | x-stor |
|---|---|---|---|---|---|
| **Overvidde:** | | | | | |
| (plaggets mål) | Ca. | 105 | 115 | 125 | 135 cm |
| **Hel lengde:** | Ca. | 66 | 68 | 70 | 72 cm |
| **Ermelengde:** | Ca. | 47 | 48 | 49 | 50 cm |

**MATERIALER: Gjestal Vestlandsgarn (100% ull) eller Superwash Sport (100% superwash ull), nøster à 50 g.**
**Kan også strikkes i Gjestal Bomull Sport (100% bomull).**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| grått nr. 205 eller hvitt nr. 217 | | | | | |
| = bunnfargen | ca. 11 | 12 | 13 | 14 | nøster |
| hvitt nr. 217 eller grått nr. 205 | | | | | |
| = mønsterfarge 1 | ca. 4 | 4 | 5 | 5 | nøster |
| burgunderrødt nr. 237 | | | | | |
| = mønsterfarge 2 | ca. 1 | 2 | 2 | 2 | nøster |
| grønt nr. 212 | | | | | |
| = mønsterfarge 3 | ca. 1 | 1 | 1 | 1 | nøste |
| okergult nr. 218 | | | | | |
| = mønsterfarge 4 | ca. 1 | 1 | 1 | 1 | nøste |

**Pinner:** Rundp og strømpep nr. 2½ og 3½ eller 4. Liten rundp nr. 3 til halsen.

1 glidelås ca. 12 cm til genser med splitt i halsen.

**Vanlige forkortelser**
M=maske, r=rett, vr=vrang, str=strikk, p=pinne, omg=omgang, vr-bord=vrangbord, glattstr=glattstrikk, rettstr=rettstrikk, vrangbordstr=vrangbordstrikk, kantm=kantmaske, arb=arbeidet, beg=begynn, forts=fortsett, sm=sammen, g=gram.

**Strikkefasthet:** 23 m glattstr i bredden og 27 omg i høyden på p nr. 3½ eller 4 måler 10 cm. **Husk at strikkefastheten må holdes hvis resultatet skal bli vellykket.**

### GENSER MED VRANGBORDER

**Bolen**

Legg opp 216-240-264-288 m med bunnfargen på p nr. 2½ og str 5-5-6-6 cm i vrangbordstr med 1 r og 1 vr. Skift til p nr. 3½ eller 4 og øk samtidig jevnt fordelt til 240-264-288-312 m . Str mønsterbord I etter diagrammet og fortsett med mønster II etter diagrammet til arb måler ca. 34-36-38-40 cm. Str mønsterbord III etter diagrammet og fortsett med mønster IV etter diagrammet. Men når arb måler ca. 60-62-64-66 cm, felles de midterste 23-25-27-29 m av forstykket til halsringningen. Str videre frem og tilbake og fell videre inn mot halsen på hver 2. p 3,2,1,1,1 (likt for alle størrelser). Str til arb måler 62-64-66-68 cm og avslutt med helt mønster. Str mønsterbord I etter diagrammet. Fortsett eventuelt med bunnfargen til arb måler 66-68-70-72 cm og fell av m.

**Ermene**

Legg opp 48-50-52-54 m med bunnfargen på p nr. 2½ og str 5-5-6-6 cm vr-bordstr med 1 r og 1 vr. Skift til p nr. 3½ eller 4 og øk ut jevnt fordelt til 61-63-65-67 m. Str mønsterbord I etter diagrammet og fortsett med mønster II etter diagrammet. Sett samtidig et merke over 1 m under ermet og øk 1 m på hver side av merket på hver 4. omg til det er ca. 115-119-123-127 m i omg. Str de nye m inn i mønsteret etter hvert. Regn ut fra midten hvor de forskjellige størrelser skal begynne. Str til arb måler 44-45-46-47 cm og str mønsterbord I etter diagrammet. Fortsett eventuelt med bunnfargen til arb måler 47-48-49-50 cm. Snu arb og str 1 omg vr og 5 omg glattstr til belegg. Fell av m. Str det andre ermet likt.

**Montering**

Merk av til ermehull i hver side tilsvarende vidden øverst på ermene. Sy 2 maskinsømmer rundt hvert ermehull på hver side av midtm i sidene og klipp opp mellom sømmene. Sy eller mask sammen på skuldrene.

**Halskant**

Plukk eller str opp ca. 109-113-117-121m med bunnfargen på liten rundp nr. 3 rundt halsen og str 5-5-6-6 cm rundt i vrangbordstr med 1 r og 1 vr (likt for alle størrelser). Fell av m til en pen jevn kant. Brett halskanten dobbelt mot vrangen og sy til med løse sting. Sy i ermene og sy belegget til flatt over sårkanten på vrangen. Fest alle løse tråder pent på vrangen.

### GENSER MED KANTER OG GLIDELÅS I HALSEN

**Bolen**

Legg opp 216-240-264-288 m med mønsterfarge 1 på p nr. 2½ og str 9 omg glattstr, 1 omg vr til brettekant og mønsterbord V etter diagrammet. Skift til p nr. 3½ eller 4 og bunnfargen. Øk samtidig jevnt fordelt til 240-264-288-312 m . Str mønster II etter diagrammet til arb måler ca. 34-36-38-40 cm. Str mønsterbord III etter diagrammet og fortsett med mønster etter diagram IV til hel lengde. **Men** når arb måler ca. 52-54-56-58 cm felles av de midterste 3 m på forstykket til splitt. Legg opp 3 nye m som str vr med bunnfargen til klippem. Str videre rundt. **Når** arb måler ca. 60-62-64-66 cm, felles de midterste 24-26-28-30 m av forstykket til halsringningen + de 3 klippem (12-13-14-15 m til hver side). Str videre frem og tilbake og fell videre inn mot halsen på hver 2. p 3,2,1,1,1m (likt for alle størrelser). Str til arb måler 62-64-66-68 cm og avslutt med helt mønster. Str mønsterbord I etter diagrammet. Fortsett eventuelt med bunnfargen til arb måler 66-68-70-72 cm og fell av m.

**Ermene**

Legg opp 48-50-52-54 m med mønsterfarge 1 på p nr. 2½ og str kant som på bolen. Skift til p nr. 3½ eller 4 og bunnfargen og øk samtidig ut til 61-63-65-67 m jevnt fordelt. Str videre som ermene til genser med vrangborder.

**Montering**

Merk av til ermehull i hver side tilsvarende vidden øverst på ermene. Sy 2 maskinsømmer rundt hvert ermehull på hver side av midtm i sidene og på hver side av midtm foran langs splitten. Klipp opp mellom sømmene. Sy eller mask sammen på skuldrene. Str eller plukk opp m med bunnfargen på p nr. 2½ ca. 1 m i hver m langs forkantene og 1 m i hvert hjørne samt tverrmasken nede i splitten. Str ca. 2 cm frem og tilbake til belegg. Øk 1 m i hvert hjørnem nede i splitten hver 2. p. Fell av m til en pen jevn kant som ikke strammer. Brett kanten mot vrangen og sy til med løse sting.

**Halskant**

Plukk eller str opp ca. 105-113-113-121 m med bunnfargen på liten rundp nr. 3 rundt halsen og str mønsterbord VI frem og tilbake etter diagrammet. Str 1 p vr fra retten med mønsterfarge 2 til brettekant og 11 p glattstr. Fell av m til en pen jevn kant. Brett halskanten dobbelt mot vrangen og sy til med løse sting. Sy i ermene og sy belegget til flatt over sårkanten på vrangen. Sy pent sm forkantene på halskanten. Fest alle løse tråder pent på vrangen. Sy glidelås i halskanten.

*Press ikke arb, men legg eventuelt plagget flatt i fasong under fuktige håndklær og la det ligge til det er tørt.*

MØNSTERBORD V



MØNSTERBORD VI






□ = bunnfargen (grått eller hvitt)
⊡ = mønsterfarge 1 (hvitt eller grått)
· = mønsterfarge 2 (burgunderrødt)
☒ = mønsterfarge 3 (grønt)
● = mønsterfarge 4 (okergult)

Tógvheilsølan
TRÁÐUR SP/F
Tlf. 312727
Sverrisgeta 19 · Postboks 181 · FO-110 Tórshavn · Faroe Islands
Tel +298 31 27 27 · Fax +298 31 96 23 · Mobile +298 21 77 27
Privat: Tel +298 31 66 48